## Lyngby vann á Frem

Meðan Atli Danielsen og Christian Lamhauge Holst vandu og spældu undir sponsku sólini saman við føroyska fótbóltslandsliðnum, hittust feløgini hjá teimum báðum í venjingardysti leygardagin. Eitt mál kom í dystinum millum Frem og Lyngby, og tað málið skoraði Lyngby. Gunnar Nielsen, sum eisini er í hópinum hjá Frem, var eykamaður til dystin leygardagin.



## Henrik Larsen í trupulleikum

Fótbóltsfelagið Køge, har Henrik Larsen er venjari, er farið í gjaldssteðg. Spælararnir høvdu fríggjadagin fund um fíggjarligu støðuna, og teirra støða tykist púrasta greið. Hópurin fer nevnliga at seta felagnum lønarkrav, og eftir hetta skal felagið - sambært DBU-reglunum - rinda lønina innan tríggjar dagar. Verður hetta ikki gjørt, hava spælararnir frítt at fara. Felagið sjálvt sendi annars fríggjadagin áheitan um at fara í gjaldssteðg.

Ítróttarliga hevur annars gingið væl hjá Køge, og eru Henrik Larsen og hansara menn við í stríðnum um at vinna sess í superliguni.

## Taptu fyri Kalmar

**Føroyska landsliðið mátti lúta fyri svenska felagnum Kalmar í venjingardysti í Spania. Landsliðsspælararnir koma nú heimaftur til Føroya**

FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*

Leygardagin spældi føroyska fótbóltslandsliðið triðja og seinasta venjingardystin á venjingarlegu í Spania.

Dysturin var ímóti svenska felagnum Kalmar. Úrslitið av dystinum gjørdist 3-1 til svenska liðið. Føroyskur málskjútti var Hanus Thorleifsson.

Føroyska landsliðið tapti fyrsta dystin í Spania, spældi síðani javnt, og í dag taptu teir aftur.

Fyri framman standa nú fyrireikingar hjá spælarunum, sum skulu taka lut í steypakappingini. Formulaliðini fara í holt við sínar dystir í kappingini annað vikuskiftið.

Í Útvarpinum segði Jógvan Martin Olsen, landsliðsvenjari, at hann var væl nøgdur við venjingarleguna. Bæði tí nógv venjing og tríggir dystir hava verið á skránni, og tí hann á ferðini hevur fingið møguleika at royna nýggjar spælarar og nýggjar leiklutir hjá gomlum spælarum. Eitt nú hevur Fróði Benjaminsen verið nýttur í miðverjuni saman við Rasmus Nolsøe. Sámal Joensen hevur aftur verið á miðvøllinum eftir fimm ára steðg, og eisini hevur venjarin nú sæð Tem Hansen í dysti fyri landsliðið.

# HF-genturnar vunn

**So gjørdu tær tað aftur: Gentuliðið hjá Havnar Fimleikafelag streyk avstað við FM-heitinum, eins og tær gjørdu í steypakappingini í januar**

FIMLEIKUR
*Lív Reinert Kjeld*
*liv.reinert.kjeld@sosialurin.fo*



*Genturnar hjá Havnar Fimleikafelag vissaðu sær gullið við eini framúr vakrari framførslu*
*Mynd: Álvur*

Ítróttarhøllin á Hálsi í Havn var fríggjakvøldið karmur um kappingina um føroyameistaraskapin í estetiskum fimleiki. Longu ein tíma áðrenn kappingina var høllin næstan fullsett av spentum áskoðarum, og teir blivu avgjørt ikki skuffaðir av framúrskarandi framførslunum hjá fimleikarunum.

### Hækkað støði

Hetta er annað árið, at skipað verður fyri føroyameistarakapping í estetiskum fimleiki, og sigast kann ikki annað enn, at fimleikaliga støðið er ótrúliga nógv hækkað. Bæði fyriskiparar, hjálparfólk, dómarar, venjarar og fimleikarar hava rættiliga funnið stevið, og hetta ger, at framtíðarútlitini fyri estetiska fimleikinum í Føroyum tykjast bjørt.

Karmarnir um kappingina vóru sera góðir. Ítróttarhøllin var vakurt pyntað við blómum og øðrum, og fimleikagólvið, sum rættiliga var sett í fokus við ljósum, var ein góð ramma til vøkru heildarmyndina, sum fimleikararnir skapaðu við rørslum, búnum og tónleiki.

Trý gentulið frá Ljósinum, Støkk og Havnar Fimleikafelag kappaðust fríggjakvøldið. Liðini høvdu øll eina framúr góða framførslu, og genturnar hjá Havnar Fimleikafelag, sum vóru síðstar á gólvinum, fullgjørdu fimleikaupplivingina hjá áskoðarunum. Tær struku avstað við sigrinum og fingu meira enn hálvtannað stig meira enn liðið hjá Støkk, sum endaði á øðrum plássi. Genturnar hjá Ljósinum endaðu á triðja plássinum.

Í estetiskum fimleiki eru trý øki, sum dómararnir hyggja eftir. Fríggjadagin vóru tveir dómarar, ið dømdu tekniskt, tað vil siga, um genturnar megna at gera ymisku teknisku krøvini til ymisku rørslurnar, javnvágirnar og støðurnar. Tríggir dómarar dømdu listarligt; teir hyggja millum annað eftir, hvussu væl rørslurnar hóska til tónleikin, hvussu heildarmyndin er, og hvussu væl venjarin hevur dugað at leggja støðið til fimleikararnar. Triðja dømingin er fyri framførsluna, og har sótu eisini tríggir dómarar og dømdu. Í dømingini um framførsluna verður hugt eftir, hvussu væl fimleikararnir fylgjast, hvussu væl teir útføra ymisku rørslurnar, hvussu samspælið er millum teirra, og hvussu væl teir duga at føra fram.

Tað var rættiliga yvirraskandi at síggja, at innanhýsis munurin millum liðini var so stórur, sum hann var hesaferð. Sammet við steypakappingina, sum var í Klaksvík síðst í januar, vóru karakterirnir væl lægri, og munurin innanhýsis millum liðini var eisini størri enn seinast. Hetta vísir, hvussu nógv kann henda eftir einans tveir mánaðar.